








# Jól á Konditarínum

Góða gamla Konditaríð í Havn er í dag ein hugnaligur handilsbygningur í sama stíli sum tá Kondittaríð var í velmaktini og best umtókta stað hjá havnarfólki.

Tað er Brynhild Restorff, ið eigur og rekur handilin Júniik, sum læt upp 1. juli í fjør. Brynhild sigur, at hon frá fyrsta degi av setti sær fyri at varðveita handilin við sama hugna sum Konditaríið hevði. Á veggjunum hanga myndir frá gamla bakarínum hjá Frants Restorff og aðrar søguligar myndir. Gólvið er so at siga tað sama, sum tá Konditaríið var har.

Júniik selur mótaklæðir til kvinnur. Tað er ein heilt serligur stemningur at koma inn í handilin sum angar av søgu við gomlum myndum, diskum og borðum, samstundis sum klæðini eru í nýggjasta móta, og jólatónleikur er at hoyra í bakgrundini.

Handilin selur merkini: Patrizia Pepe, A-Pair, Alberto Fermani, Baum und Pferdgarten, Pure heart, Danza, Filippa K, Sand, Modstrøm, Numph, Black Lilly, BcChristensen, Parajumpers, Designers Remix og KayCee.



Søgan um Kondittaríið byrjar, tá Kristina Restorff í 1925 læt upp Restorffs Kondittarí á Glade Hjørn í húsunum sum Andras Samuelsen hevði átt.

At Konditaríið, sum í mong ár var partur av bakarínum hjá Frants Restorff, framvegis er í Restorff familjuni, fegnast Brynhil Restorff um og bjóðar øllum vælkomin inn í handilin, sum er á tremur við jólagávuhugskotum sum t.d. kjólum, stivlum, vøttum, handskum, oyravarmarum, taskum, blusum og buksum.

